


# Eldraøkið skal sameinast og gerast meira smidligt



Val

RÓSA SAMUELSEN

valevni fyri Sambandsflokkin

Av egnum royndum veit eg hvussu tað er at hava við eldri og óhjálpið fólk at gera. Hvussu ørkymlandi tað er at renna frá hurð til hurð og lítla og onga hjálp at fáa. Heimahjálpirnar og heimasjúkrasystrarnar skulu ikki lastast, tær gera sítt arbeiðið til lítar.

Øll skulu hava møguleikan at velja hvar ein vil búgva tá ein gerst gamal, men tað skal eisini vera ein tryggleiki at vera heima og fáa tað hjálp sum brúk er fyri. Er hjálpin ikki har tá brúk er fyri henni kann øll familjan syndrast.

Tilboði til heimabúgvandi eldri skal styrkjast soleiðis, at tað er ein rættur at fáa heimahjálp og heimasjúkrasystir.

Møguleiki skal vera hjá teim eldru at fara til dagtilhald soleiðis, at tey avvarðandi ikki hava ampa av teimum, meðan tey eru til arbeiðis. Annars er vandi fyri, at tey gomlu ganga fyri vág og vind. Møguleiki skal vera á dagtilhaldinum at keypa mat og fáa hvíld eina løtu.

Fleiri eldri og einlig liggja einsamøll, bangin og ótrygg um náttina, her eigur heimahjálpin at koma á gátt.

Við at hava hesi tilboð til eldri hava tey møguleikan at vera heima so leingi tey vilja. Tá so dagurin er komin og tað ikki er gjørligt at vera heima, skal heimarøktin syrgja fyri, at pláss er á ellisheimi ella sambýli. Í dag er tað mangan, at tey avvarðandi renna frá einum heimi til annað uttan at fáa nakað burturúr.

Seinast, men ikki minst, skal tað ikki verða avgerandi, um tey eldru eru før fyri at skriva undir umsóknarskjølini. Til dømis hava minnisveik ikki førleika til at meta um sína egnu støðu.

Eldraøkið skal sameinast og gerast meira smidligt soleiðis, at hevur ein brúk fyri heimahjálp, mat-tænastu, dagtilhald, umlætting ella stovnsplássi, skal ein venda sær til eitt og sama stað.

# Vakstrarbúskap



Val

KÁRI Á RÓGVI

Sjálvstýrisflokkurin

Føroyingar eru ævigir optimistar í ítrótti og stinga seg manga fram í oddin, vit eru altíð klár at taka sangkappingar upp, og føroyingar manna skipa um alla verðina.

Kenna útlendingar bara til føroyskan ítrótt, tónleik og sjómansskap, so vænta teir at síggja tann helsta framúrskarandi vakstarbúskapin í Føroyum.

Men so er ikki.

Hóast búskapurin gongur sum ongantíð fyrr og tykist alsamt meiri fjøltáttaður, so er bara 'gloom and doom' at hóma.

Frøðingar og støðingar skeldast um nær kreppan kemur, nær eldrabylgjan fer at raka, og hvørt lægri íløgur ella tálmaður rakstur best fyrireika okkum til at óumgeingiligu niðurgongd, naggatóðn og krepputilgongd ið væntast má hvørja løtu.

Hvat var av at vera við fyri at læra? Hvat var av, at føroyingar vinna allastaðni? Hví royna vit ikki nýggjar leiðir uppi á landi eisini?

Laxafossurin er uppi í tíðini og hevur hann uppiborið nógv rós fyri at siga nøkur borgarlig orð mótvegis javnaðaroysli og vinningbýti hjá sp/f fólkaflokkinum.

Og tó. Hann tykist bara seta gamlar fordómar í system. Vælferð og almennur rakstur eru nakað ið vit eta, tí skulu vit fyrst skapa frumvøkstur ið er blokkur ella toskur. Eta vit lítið kann nógv setast á bók - og so kunnu vit eta rentur tá ið fáu ið ikki flyta verða so elligomul at ongin er at arbeiða.

Klandrið av samgongumonnum hevur bara sannført meg um eittans: teir hava allir skeivt.

Búskapurin er ikki upphitaður - hann er bara for lítil, illa skipaður og óneyðuga niðurbundin.

Føroyski búskapurin er sum telda í órøkt. Rammini eru ov fá, dust og virussar og gomul forrit halda henni aftur.

Vit hava - vegna turkatrúnna uppá at vitan er útreiðsla og skúli og gransking eru at rokna uppí tyngjandi skrivstovuveldi - valt at útflutt ugndóm. Sjálvur varð eg útfluttur í 1993 og havi samanlagt búð eini 7 ár uttanlands tó at tvey høvdu verið ivaleysa leingi.

Góvust vit við hesum, kundu Føroyar uttan trupulleika vaksið við 3-500 fólkum um árið næstu 10 árini, ja enn fleiri løgdu vit í.

Vit hava - vegna vamlisligu ræðsluna og hjá Brekkmanni og manglandi uppslýsing hjá verkafjøldini og serliga vegna manglandi politiska fyrireiking - forsømt at heita á útlenska arbeiðsmegi um at ríka land okkara. Á heimagreiðslunum í Íslandi ber til at velja ímillum íslenskt, danskt, enskt - og pólskt; tey bjóða øllum dugnafólkum til lands, kunna tey á teirra egnu málum um íslenska arbeiðsmarknaðarlóg og galdandi sáttmálar, lata tey brúka síni egnu mál ella onnur kunnu mál í samskifti - men krevja eisini at tey royna at læra seg íslenskt. Seinast eg var á Norðlandinum hevði thailendari keypt sær snellubát - og fegnaðust íslendingar um at hesin maður var komin, hevði arbeitt dúgliga, lært seg málið, spart sær til egnan bát og dámdi væl (tó at nakað kalt var).

Soleiðis gera okkara tjóðskaparligu systkinabørn. Onki glúm og dúm. Onki við at vóna eftir at blokkur og toskur og realavkast av grunni skal so dánt halda okkum í holdum á tjóðarinnar gamalsaldri.

Nei skal vendast til ja; fráflyting til tilflyting; vit reinsa búskaparliga motorin, so hann kann orka meira og ganga bæði skjótari og heitari!

Vit mugu broyta føroyska búskapin frá til ljósan og jaligan vakstarbúskap. Áræði, førleiki og umskiftishugur ið so nógv merkja ítrótt, tónleik og sjóvinnu mugu flytast yvir á hægri útbúgving, almenna tænastu og vitanarvinnu.

Pengar til hesi endamál er ikki útreiðsla og rakstur ið bert kann fíggjast av tí 'veruliga búskapinum' - hetta er í sjálvum sær veruligur frumbúskapur (hvør er tað ið keypir føroyska fiskin annað enn hægri útbúgvin tænastuvinnandi fólk í øðrum londum?)

Men, ikki skal standa á at finna tølini á fíggjarlógini. Milliónir fara óneyðuga til stuðulsskipanir. Milliónir fara óneyðuga til rentur. Milliónir fara óneyðuga at senda ungfólk, sjúk fólk, almenn starvsfólk og onnur av landinum at útbúgva seg, til viðgerðar ella endurútbúgvingar.

Tá ið vit hava fingið ungdómin heim, betri útbúgvingar, betri mentunartilboð og harvið bæði fólka- og búskaparvøkstur, tá verður vónandi ein avleiðingin, at vit gevast at endurliva kreppur allatíðina, uttan heldur syrgja fyri at gera førleika- og framleiðslugevandi íløgur fyrst og fremst og njóta uppgongdina heldur enn at frykta niðurgongdina.

Tit 'old timers' sigið í kór: "Vit vilja vakstarbúskap! Bjartskygni betri enn at bína er!" So fer at ganga...

...stig fyri stig.

# Lesandi við børnum hava ov vánalig kor



Val

RAGNAR MOURITSEN

Miðflokkurin

Vit hava í Føroyum eina útbúgvingarskipan, ið tryggjar øllum atgongd til at fáa eina útbúgving. Útbúgvingin er ókeypis og tann lesandi fær somuleiðis lestrarstuðul. Hettar er eisini í tráð við ynski hjá Miðflokkinum, um at geva øllum føroyingum eina útbúgving, so Føroyar kann gerast eitt vitanarsamfelag.

Tó eru tað ikki øll í okkara samfelag, sum hava eins góða atgongd til at nema sær vitan. Tey, ið hava eina skyldu yvirfyri einum barni, fáa illani lestrarstuðulin at røkka. Og umsorgan av barninum avmarkar tann lesandi at arbeiða samstundis við lestnað. Í Miðflokkinum meta vit familjuna verða hornasteinurin í samfelagnum, og tí vil eg virka fyri at lesandi við børnum fáa betur kor.

Lesandi fáa í dag góðar 3600 kr. mánaðarliga, umframt ein barnastuðul á 600 kr. fyri hvørt barn. Eg vil virka fyri at barnastuðulin verður hækkaður munandi, soleiðis at lesandi við børnum klára at taka eina útbúgving. Stuðlurin kundi fari upp á eini 2.000,- fyri hvør barnið.

Eisini eiga lesandi við barni, at fingið koyripengar, á sama hátt sum onnur, ið arbeiða t.d. í Havn og búgva á bygd, so at tey hava betri umstøður at koyra og avheinta barnið á stovni.

Tað er okkara skylda sum samfelag at geva okkara bø rnum tryggar og góð ar umstøður – serliga tá ið ta ð er okkara ynski at foreldrini fá a eina útb úgving.

# Vágar fyrst og síðan framtíðar flogvøll



Val

RODMUNDUR NIELSEN

valevni Fólkaflokksins á Lista A, sjálvandi!

Nú skal arbeiðast miðvíst fram ímóti at finna ein trygga framtíðarloysn á okkara flogvallarviðurskiftum. Hetta er okkara samband við útheimin. Sum tað fyrsta, er tað neyðugt at útbyggja verandi flogvøll fyri ikki at steðga upp á hesum økinum. Síðan leggja vit okkum eftir at finna fram til og gera neyðugu teknisku kanningarnar, soleiðis at vit kunnu fara undir ein altjóða flogvøll í landinum. Lat sakkunnleikan tala um altjóða vøllurin fer at liggja í Nólsoy, Skorhæddini ella í Søltuvík og lat okkum politikkarar taka okkum av politikki.

# Hmmm, konufólk



Val

JÓNLEIF JOHANNESEN

valevni hjá Javnaðarflokkinum

Menn í Føroyum vilja hava konufólk, einki nýtt í tí. Nú má tó dyrgjast við øllum listum, tí tær fækkast í tali.

Javnaðarflokkurin vil sláa tvær flugur við eitt smekk. Vit taka tveir flokkar inn á lærara og pædagog útbúgvingina komandi árini. Har avtrat styrkja vit møguleikarnar fyri fjarlestri og økja næmingatalið av sjúkrarøktafrøðingum. Á henda hátt fáa eini 50 fleiri kvinnur møguleikan at útbúgva seg í Føroyum. Á henda hátt fáa vit hjálpt sjúkraverki, skúlum og stovnum, sum skríggja eftir lærdum fólki. Á henda hátt fáa miðalmenn aftur ein kjans.

Hey, har vóru tríggjar flugur.